
Fylgiskjal til partin um: Viðlíkahald av landsins ognum sum liður í at fáa eitt støðugari lærlingatal

Tilgongd av lærlingum

Sum lýst í "Tilmæli um tillagingar – Endurskoðan av yrkisútbúgvingarøkinum" (Mynd 3 og 4) fylgjast samlaðu íløgurnar hjá tí almenna og tilgongdin av nýggjum lærlingum rættiliga neyvt, hóast tað er ymiskt, hvussu arbeiðskrevjandi, ymsar íløgur hjá tí almenna eru.

Íløgur hjá tí almenna og lærlingasáttmálar 2003 til 2017 Mynd 3


Almennar íløgur á vinstra aksa og lærlingaupptøkur á høgra aksa



Viðm.: Tað almenna fevnir um almenna fyrisiting og tænastu (land, kommur, ríkisfyrisiting og sosialar grunnar) og almennar fyritøkur, ið eru allar almennar eindir, ið framleiða á marknaði. Almenn íløga fevnir um útreiðslur í samband við nýbygging, umframt keyp av flutningstólum, maskinum, software og innbúgv vm.

Keldu: Hagstova Føroya (íløgur fyri landskassa, kommunur og sosialar grunnar), Búskaparráðið (íløgur fyri almennar fyritøkur) og Yrkisráðið (lærlingasáttmálar)

Almennar íløgur og lærlingatilgongdin, 2003 til 2017 (indekstøl, 2003=10(Mynd 4



Viðm.: Tað almenna fevnir um almenna fyrisiting og tænastu (land, kommur, ríkisfyrisiting og sosialar grunnar) og almennar fyritøkur, ið eru allar almennar eindir, ið framleiða á marknaði. Almenn íløga fevnir um útreiðslur í samband við nýbygging, umframt keyp av flutningstólum, maskinum, software og innbúgv vm.

Keldu: Hagstova Føroya (íløgur fyri landskassa, kommunur og sosialar grunnar), Búskaparráðið (íløgur fyri almennar fyritøkur) og Yrkisráðið (lærlingasáttmálar)

Niðanfyri standandi yvirlit yvir árligu tilgongdina av lærlingum innan fakøkini er brúkt til at hyggja hvussu sveiggini eru innanfyri ymsu fakini:

Fakøki niv Randi	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	
Fødevarer mv. (FJO)	6	9	15	25	35	39	25	25	19	16	19	24	22	27	12	27	31	28	404
Kontor, handel og forretningsservice (KHF)	1	24	59	67	60	130	130	91	67	67	73	69	86	85	92	106	103	100	1410
Gartneruddannelser	0	0	1	2	0	3	5	0	1	1	3	0	0	0	1	0	2	1	20
Oplevelsesområdet (FJO)	5	8	7	10	9	13	20	26	11	18	14	8	9	9	13	3	10	11	204
Teknologiområdet, cykel-, auto- og skibsmekanik mv. (TBT)	14	12	14	12	21	23	23	34	12	14	14	15	17	14	20	15	18	24	316
Teknologiområdet, grafisk teknik og medieproduktion (TBT)	6	2	11	2	3	7	10	10	5	1	2	0	2	7	2	5	5	1	81
Teknologiområdet, maskinteknik og produktion (TBT)	32	47	43	33	40	62	58	47	13	34	40	49	68	43	54	76	66	55	860
Teknologiområdet, strøm og elektronik mv. (TBT)	26	27	20	14	18	38	54	50	17	26	29	31	43	45	43	36	50	52	619
Byggeriområdet (TBT)	37	46	40	42	52	91	88	40	27	47	53	47	44	48	52	53	74	80	961
Ymiskt	2	2	4	3	4	2	3	5	1	1	1	0	0	0	0	0	5	7	40
	129	177	214	210	242	408	416	328	173	225	248	243	291	278	289	321	364	359	4915

Viðm.: Donsku heitini eru úr hagtalsskipanini.

Grafurin samanber sveiggini í samlaða lærlingatalinum við sjey tey størstu fakøkini. Fyri hini fakøkini eru tølini so smá, og lutfalslig sveiggj so stór, at tað ikki gevur meining at samanbera lutfalslig sveiggj.



Teknisk viðmerking: Til grafin eru brúkt rullandi miðal av tveimum fylgjandi árum í staðin fyri einstøk ár.

Tá hugt verður nærri eftir sveiggjunum í lærlingatali fyri undirbólkar/fakøki, fylgjast sveiggini nógv í øllum bólkum. Eitt undantak er øki upplivingaøkið (við bláum), ið umfatar frisørar og kosmetikarar.

Fyri at hyggja nærri eftir útsveiggjunum í tali av lærlingum, er sett upp í talvu við muninum á lægstu árligu tilgongd og miðal tilgongd fyri hvørt fakøki:

Fakøki (donsku heitini eru úr hagtalsskipanini)	**Munur á lægstu og miðal tilgongd**
Fødevarer	15
Kontor, handel og forretningsservice	67
Gartneruddannelser	1
Oplevelsesområdet	5
Teknologiområdet, mekanik mv.	4
Teknologiområdet, grafisk teknik og medieproduktion	4

Teknologiområdet, teknik og produktion	25
Teknologiområdet, elektronik mv.	18
Byggeriområdet	20
Ymiskt	2
Samanlagt	122

Alment viðlíkahald og tørvurin á arbeiðsmegi

Tað er rættiliga arbeiðskrevjandi at viðlíkahalda almennar bygningar, og eru tað serliga handverkarar, ið tørvur er á. Eisini landsvegahald krevur væl av arbeiðsmegi, men her eru tað mest arbeiðsfólk sum fáa arbeiði.

Við tveimum myndlum frá Landsverk er roynt at meta um, hvussu tørvurin á arbeiðsmegi verður øktur, tá landið hækkar játtanina til landsvegahaldið og til umvæling av landsins bygningum.


Útrokningarnar byggja á fortreytir, sum eru mettar at vera hóskandi avrundingar til hesar útrokningar, men ávís óvissa er sjálvsagt við teimum tølum, sum útrokningarnar koma fram til.

Landsvegahaldið

Fyri vegahaldið hevur Deildini fyri Infrakervi á Landsverk sett upp, hvussu býtið av verandi játtan á 43 mió. kr. er millum ymsar innanhýsis (planlegging) og uttanhýsis (fremjan) útreiðslur, og metir so í hvønn mun hesir partar vaksa, tá samlaða játtanin veksur. Býtið fyri verandi játtan er mett til 7,6 mió. kr. innanhýsis útreiðslur til planlegging, og 35,1 mió. kr. uttanhýsis útreiðslur til fremjan.

Fyri at gera útrokningarnar einfaldari, er lagt inn sum fortreyt, at øll økingin í játtanini fer til uttanhýsis útreiðslur. Mett verður ikki at hetta er órealistiskt fyri øking í játtanini sum her er talan um. Tað er eisini lagt inn sum ein fortreyt fyri útrokningunum, at allir partar av uttanhýsis útreiðslunum (vanligt hald, vetrarhald og asfalt) vaksa lutfalsliga líka nógv. Hetta kann vera ein fortreyt sum ikki heldur heilt, men hon ávirkar ikki endaliga úrslitið fyri tørv á arbeiðsmegi avgerandi. Fyri vanligt hald er býtið av útreiðslum til tilfar og lønir 30:70, fyri vetrarhald er lutfallið 50:50, og fyri asfalt er lutfallið 65:35. Fyri lønarútreiðslur er býtið millum handverkarar og arbeiðsfólk í øllum trimum førum mett til 10:90.

Uppsetingin hjá Landsverki við ávísum tillagingum sær út sum víst niðanfyri:



Metingin er, at ein øking í játtanini til landsvegahald við 20 mió. kr. økir tørvin á handverkarum við 2,2 ársverkum og tørvin á arbeiðsfólki við 23,5 ársverkum.


Umvæling av landsins bygningum

Fyri viðlíkahald av landsins bygningum hevur Byggideildini á Landsverki sett upp, hvussu býtið av verandi játtan á 21 mió. kr. er millum ymsar innanhýsis og uttanhýsis útreiðslur, og hvussu samansetingin av uttanhýsis útreiðslum er millum tilfar og lønir til ávikavist handverkarar og akademikarar. Mett er síðani um, hvussu útreiðslurnar til ymsu partarnir vaksa, tá samlaða játtanin veksur.

Fyri at gera útrokningarnar einfaldari, er lagt inn sum fortreyt, at øll økingin í játtanini fer til uttanhýsis útreiðslur. Mett verður ikki at hetta er órealistiskt fyri øking í játtanini, sum her er talan um. Tað er eisini lagt inn sum fortreyt fyri útrokningunum, at innanhýsis útreiðslurnar hjá Landsverki til verkætlanarleiðslu eru fastar og øll økingin í játtanini fer til tilfar og lønir til handverkarir, og til uttanhýsis projektering og eftirlit.

Í útrokningunum er lagt inn, at útreiðslurnar til projektering og eftirlit er góð 8% av uttanhýsis útreiðslunum, og at útreiðslurnar til tilfar og til handverkaralønir eru býttar 50:50.

Uppsetingin hjá Landsverki við ávísum tillagingum sær út sum víst niðanfyri:



Goldið í 2018				Intern		Extern				Ársverk	
				Lv-leiðsla		Tilfar		Løn HV	Løn AM	Handverkarar	Akademikarar
1001 Handverkarar (tilf+løn)	kr	15.248.855	7,2%			36,2% kr	7.624.428	36,2% kr 7.624.428		14,1	
1002 Projektering og eftirlit ext	kr	1.371.226	7%						6,5% kr 1.371.226		1,7
1004 Verkætlanaleiðsla	kr	4.424.705	21%	21,0% kr	4.424.705						4,6
Tilsamans	kr	21.044.786	100%	21,0% kr	4.424.705	36,2% kr	7.624.428	36,2% kr 7.624.428	6,5% kr 1.371.226	14,1	6,3

Fremjan	1 Ár	Intern		Tilfar		Løn HV		Løn AM		Ársverk	
Demi 1	Játtan kr 437.445.000									Handverkarar	Akademikarar
	1001 Handverkarar (tilf+løn)			45,4% kr	198.647.157	45,4% kr	198.647.157			367,9	
	1002 Projektering og eftirlit ext							8,2% kr	35.725.980		44,1
	1004 Verkætlanaleiðsla	1% kr	4.424.705								4,6

Fremjan	11 Ár	Intern		Tilfar		Løn HV		Løn AM		Ársverk	
Demi 2	Játtan kr 61.044.786									Handverkarar	Akademikarar
	1001 Handverkarar (tilf+løn)			42,5% kr	25.974.344	42,5% kr	25.974.344			48,3	
	1002 Projektering og eftirlit ext							7,7% kr	4.671.399		5,8
	1004 Verkætlanaleiðsla	7% kr	4.424.705								4,6

Fremjan	17 Ár	Intern		Tilfar		Løn HV		Løn AM		Ársverk	
Demi 3	Játtan kr 48.044.786									Handverkarar	Akademikarar
	1001 Handverkarar (tilf+løn)			42,5% kr	19.093.125	42,5% kr	19.093.125			35,4	
	1002 Projektering og eftirlit ext							7,5% kr	3.483.830		4,2
	1004 Verkætlanaleiðsla	10% kr	4.424.705								4,6

Eftirleip 2019 "tilfar og handverkaralønir"		Planlegging		Tilfar		Løn HV		Løn AM	
1. Ídegar og myndu (prekalkulav	kr 103.799.000			50% kr	51.649.500	50% kr	51.649.500		
2. Ávarsligt	kr 232.908.000	7%	?	50% kr	116.454.000	50% kr	116.454.000	7%	?
3. Vanligt viðlíkahald	kr 101.238.000			50% kr	50.619.000	50% kr	50.619.000		
	kr 437.445.000			0,5 kr	218.722.500	0,5 kr	218.722.500		

Bygningar Vegir

Metingin er, at ein øking í játtanini til umvæling av landsins bygningum við 40 mió. kr. økir tørvin á handverkarum við 34 ársverkum og tørvin á akademikarum við 4,1 ársverkum.